# Politistur

### Eitt arbeiði við avbjóðingum

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.



*Høvuðsuppgávan hjá politinum er:*

- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribygja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur ikemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur vera hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet – ikki minst millum børn og ung.

*Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðingin fyri rættartrygdini hjá borgaranum.*

### Eitt arbeiði allan sólarringin

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.



Her er eitt gott samanhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at røkka felags málum. Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum – um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí. Atlitið til borgaran og samfelagið er allatíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar.

### Løn og útbúgving

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum. Royndartíðin er 3 ár. Aftaná tað fært tú – um tú ert egnaður til politiarbeiðið– fast starv sum politistur.

### Menning og karriera

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politiið hevur eina røð av serskeiðum – og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.



### Ynskir tú at vera við?

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelaganum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði – og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

*Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:*

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

**Meira kunning**

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflýggjað ella sent.

Føroya Landfúti
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Boks 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 14 48 Fax 31 82 66
Heimasíða: www.politi.fo

**Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. 4 politistar skulu setast í ár. Umsóknarfreistin til hesar upptøkuroyndirnar er 20. mars 2000.**

---

# Dansifrøi



**Avdansiveitslan verður leygardagin 18. mars í Hoydølum.**
Borðhaldið byrjar kl. 19.30.
Aftaná verður dansur og høvi verður at dansa teir dansir, vit hava lært í vetur.
Kostnaður: 150 kr.
**Seinasta freist at keypa atgongumerki er hósdagin 16. mars í Mótaskálanum, Dr. Jacobsensgøta, ella hjá nevndarlimunum.**

**Við dansikvøðu**
**Nevndin**

---

**Hitaverk - Sanitet**
**Vatnleiðingar - Frárenningar**
**Takrennur**

# T - Rør

**Tel. 221 241**

---

*Lýsið í* **sosialinum**

---

STARV sosialurin

sosialurin sosialurin

# Grafikari til Sosialin

Søkt verður eftir grafikara til Sosialin at byrja 1. apríl ella skjótast tilber.

Umsøkjarar við grafiskari útbúgving og royndum innan blaðumbróting hava fyrimun.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Prentarafelag og Føroya Prentsmiðjufelag.

Umsókn, merkt grafikari, verður at senda til:

Sosialurin, box 76,
110 Tórshavn

Í seinasta lagi 20. mars.

*Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sosialin 311820 og spyrja eftir Torkil Johannesen.*

Sosialurin er eitt livandi og spennandi arbeiðspláss. Har starvast í dag umleið 25 fólk. Uppgávurnar eru bæði áhugaverdar og fjølbroyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna. Á prentsmiðjuni, sum er partur av fyritøkuni, verða umframt Sosialin eisini prentað onnur bløð. Sosialurin umsetti í fjør fyri uml. 10 milliónir krónur. Á grafisku deildini starvast 7 fólk harav 2 lærlingar. Deildin er útgjørd við teimum mest framkomnu teldunum og forritunum innan tað grafiska.

---

# Sjúkrasystir

**Ellis- og umlættingarheimið hjá Tórshavnar kommunu søkir eftir sjúkrasystur.**

**Starvið**

Fevnur um røkt og umsorgan fyri teimum búfólkunum sum búgva á heimunum. Umframt sjúkrasystrar taka heilsuatstøðarar og hjálparfólk sær av teimum, sum búgva á heiminum.

**Setunarviðurskifti**

Talan er um eitt avloysarastarv í tíðarskeiðinum hálvan juli 2000 til 1. september 2001. Arbeiðstíðin er 0,65 tíð og er skipað í vaktum. Starvið verður lønt eftir sáttmálanum millum Føroya sjúkrasystrafelag og Føroya landsstýri.

**Meir fæst at vita**

um starvið við at venda sær til Sólgerð Djurhuus, fyristøðukvinnu, tlf. 31 18 39, ella Hanne-mi á Brúgv, deildarsjúkrasystir, tlf. 31 55 22.

**Umsókn**

saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, Postbox 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 27. mars 2000. Merk umsóknina "Sjúkrasystir"

Í Ellisheiminum, ið er 65 ára gamalt, búgva 25 fólk. Í Umlættingarheiminum er pláss fyri 8 búfólkum, ið kunnu vera har til umlætting í 6 vikur um árið.

Tórshavnar kommuna

---



# Ford Escort til sølu



**Ár.:** 3 1/2
**Km.:** 82.000
**Litur:** Myrkagrønur
**Diesel**

Bilurin er ikki roykjarabilur, nýsproytaður, hevur sportsfelgur, vel og sóltak.

Boð undir kr. 100.000,- hava ongan áhuga.

*Tel. 315979 og 283061*

---



Vit gera alt
# URTAGARÐSARBEIÐI

• Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flísum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.

Spyr - tað kostar einki!

Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta

**Fa. SÍMUN DALSGAARD**
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78

---

# TILBOÐ

**Frá leygardegnum 11/3 til 18/3 lata vit:**

**÷10% av stálvaskum**

**÷20% av øllum kranum**



*Tilboðini eru eisini galdandi í Runavík teir dagar opið er.*
*Vit hava eisini stórt úrval av bæðirúmsmøblum.*

**VVS-HORNIÐ**
**Lágpríshandil**

Landavegur 2 - 100 Tórshavn - Tel. 318023 - Fax 310963
Runavík • Tel. 447773 *Opið:* Mikud.....13.00-17.30
Leygard. 10.00-14.00

Sosialurin - 311820

---

# DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**

---

# Marknaðar-/søluleiðari

Fyri eina fyritøku á Skálafjørðinum søkja vit eftir dugnaligum fólki til at taka sær av marknaðarføringini. Fyritøkan er ein størri handilsfyritøka, sum selur og veitir tænastur til fyritøkur og persónar í øllum landinum.

Starvið, ið er sera fjølbroytt, fevnir í høvuðsheitum um fylgjandi arbeiðsuppgávur:

**Marknaðarføring**
- at skipa marknaðarføringina hjá fyritøkuni
- at tilrættisleggja lýsingarátøk
- at standa fyri gerð av sølufremjandi tilfari so sum faldarum og lýsingum

**Søluarbeiði**
- at aktivt seta seg í samband við møguligar kundar bæði skrivliga og við kundavitjanum
- at hava samskifti við kundar, sum venda sær til fyritøkuna
- at veita verandi kundum eina góða ráðgeving og tænastu

Vit leita eftir einum persóni, við góðari handilsligari útbúgving serliga við atliti at marknaðarføring, sameint við gott hugflog, ágrýtni og arbeiðssemi. Tað krevst, at tú dugir og dámar væl at arbeiða sjálvstøðugt og ikki er bangin fyri nýggjum avbjóðingum. Á tí tekniska økinum vænta vit at tú hevur hollan telduførleika, og at tú dugir at nýta tey mest vanligu telduforritini.

Løn og setanartreytir annars verða sambært avtalu við arbeiðsgevara.

Umsóknir verða sendar skjótast gjørligt, og í seinast lagi fríggjadagin 31. mars 2000 til:
Virkisráðgeving Spf. Boks 26, 600 Saltangará. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Virkisráðgeving Sp/f, tlf. 44 95 91 og tosa við Símun Hammer. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Virkisráðgeving Spf
**Leiðsla - Búskapur - Marknaðarføring - Rekruttering - Góðskuskipanir**
Heimasíða: http://www.konsult.fo

---

# 3arin søkir 3 fólk

## Lærling til fotodeild okkara

*Lærutíðin er 3 ár og tú mást hava FHS.*
*Í lærutíðini skalt tú í skúla í Odder í Danmark nakrar ferðir - og tú luttekur eisini í innanhýsis skeiðum hjá okkum.*

**Vit vænta:**
- *At tú helst hevur koyrikort og góðan kunnleika til EDV/KT*
- *Hevur áhuga fyri foto og ert fyrikomandi og ágrýtin*
- *Hevur lætt sinnalag.*

**Vit bjóða:**
- *Løn eftir nærri avtalu*
- *Gott arbeiðsumhvørvi, við einum ungum dynamiskum liði av arbeiðsfelagum.*

## Lærling til fløgudeild okkara

*Lærutíðin er 3 ár og tú mást hava FHS.*
*Í lærutíðini skalt tú í skúla í Danmark nakrar ferðir - og tú luttekur eisini í innanhýsis skeiðum hjá okkum.*

**Vit vænta:**
- *At tú helst hevur koyrikort og góðan kunnleika til EDV/KT*
- *Hevur áhuga fyri tónleiki, tøkni og ert fyrikomandi og ágrýtin*
- *Hevur lætt sinnalag*

**Vit bjóða:**
- *Løn eftir nærri avtalu*
- *Gott arbeiðsumhvørvi, við einum ungum dynamiskum liði av arbeiðsfelagum.*

## Fólk søkist til EDV deild okkara

*3-arin vil fegin hava fatur á tær um tú hevur áhuga at arbeiða saman við einum ungum og dynamiskum liði, har tú fært møguleika at royna eitt sindur av hvørjum innan eina vinnu, ið er í framgongd hvønn dag.*

**Vit vænta at tú ert:**
- *fyrikomandi og smílandi*
- *Tænastuvinarlig/ur*
- *Vælkunnað/ur innan EDV og hardware og hevur hollan kunnleika innan internet*
- *Áhugað/ur innan alt sum eitur software og spøl*
- *Sjálvstøðug/ur*

*3-arin arbeiðir sum eitt lið, men sum samstundis er skapt av einstaklingum, ið fáa møguleika at vísa hvat tey kunna. Vekir hetta tín áhuga, so send eina umsøkn.*

*Hondskrivað umsøkn verður send til okkum* ***innan 20. mars 2000.*** *Størvini skulu setast 01. apríl 2000.*

***3'arin***
***SMS***
***Att.: Gissur Patursson***
***Postboks 1057 - 1058***
***FO 110 Tórshavn***

3arin

*SMS • Tel. 31 98 20 - 31 06 06 • Fax 31 49 55*
*E-mail: tryarin@post.olivant.fo*

Sosialurin - 311820

---

**VEGG SAGING**
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

**HOL SAGING**
Frá Ø 24 mm.
til Ø 450 mm.

**GÓLV FRESING**

**GÓLV SLÍPING**

**GÓLV SAGING**
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

**FØROYA BETONG SAGING** v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820